Vildi ikki at landi

Grindin, sum týsmorgunin varð funnin norður úr Viðoynni, var seint týskvøldið stødd langt norður úr Eiðisflógva, tá ið menn umsíðir gjørdu av at rýma frá henni

GRIND
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Grindin, sum báturin, Skurðaklettur, tíðliga týsmorgunin fann einar sjey fjórðingar norður úr Viðoynni, vildi ikki at landi.

Sýslumaðurin í Eysturoy, Kristian Martin Joensen, sigur, at seint týskvøldið lógu bátar hjá grindini langt norður úr Eiðisflógva.

– Men, sum vit hava skilt, fekst ongantíð veruligur rakstur á grindina, hóast fleiri bátar vóru hjá henni.

Hann sigur, at sambært tí, ið løgreglan í Runavík hevur skilt, vóru eisini springarar uppi í bólkinum.

– Tað kom slett ikki uppá tal at halda henni til nakrastaðni. Grindin vildi hvørki inn í Sundini, ei heldur suður gjøgnum Djúpini. Hon helt sína leið vestureftir, og at enda týskvøldið var hon stødd langt norður úr Eiðisflógva, tá ið bátarnir avgjørdu at fara frá henni, sigur Kristian Martin Joensen.

Menn, sum vóru hjá grindini, mettu hana at vera einar 150 hval.

Fimm ær brendu inni í Fuglafirði

Tað fekk rættiliga óhepnar fylgjur, at tveir smádreingir, 9 og 11 ára gamlir, spældu við eld í einum neysti í Fuglafirði mánadagin: Neystið brendi í grund, og fimm ær brendu inni

ELDUR
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

»Lítil neisti kann gera stóran eld«, plaga vit at siga.

Hetta kunnu tveir ólukkuligir smádreingir í Fuglafirði, 9 og 11 ára gamlir, ásanna.

Seinnapartin mánadagin vóru teir í einum neysti, tætt við gamla Timburhandilin í Fuglafirði. Í neystinum var hoyggj, og har stóðu eisini 5 ær.

Eldur í…

Um gott 17-tíðina mánadagin kom eldur í neystið, og hóast sløkkiliðið í Fuglafirði, sum annars er væl útgjørt, kom á staðið, stóð neystið ikki til at bjarga.

Umleið ein tíma eftir, at eldurin varð fráboðaður Alarmsentralinum, var neystið brent í grund.

Í neystinum var hoygg, og har stóðu eisini 5 ær, sum brendu inni.

Kanningarnar hjá løgregluni hava staðfest, at smádreingirnir, sum vóru í neystinum hendan seinnapartin, hava spælt við eld.

Lærupeningur

Sýslumaðurin í Eysturoy, Kristian Martin Joensen, heldur tað ikki vera hugsandi, at dreingirnir høvdu ætlanir um at seta eld á neystið.

– Teir hava spælt við eld. Eldur er komin í hoyggið, og síðan hevur hann breitt seg.

Hann heldur ikki, at smádreingirnir droymdu um tær avleiðingar, sum hetta kundi fáa.

– Dreingirnir eru avhoyrdir saman við foreldrum og barnavernd, men avhoyringarnar eru ikki lidnar.

Sýslumaðurin vísir á, at hetta er eitt talandi dømi um avleiðingarnar, ið kunnu standast av, at børn spæla við eld.

– Ein keðiligur lærupeningur, leggur Kristian Martin Joensen aftrat.

Neystið í Fuglafirði brendi í grund, og 5 ær brendu inni. – Ein keðiligur lærupeningur, heldur sýslumaðurin í Eysturoy, Kristian Martin Joensen

Mynd: Leif Andersen

»Sig nei til stoffir…«

Skúlin í dag er ikki, sum hann var fyrr. Nú verður javnan skipað fyri verkætlanum og evnisdøgum, har næmingar læra at arbeiða í bólkum við ymiskum evnum

SKÚLI
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Tá ið tey, sum eru tilkomin í dag, vitja ein skúla saman við børnum sínum, sæst skjótt, at skúlin er nógv broyttur, síðan tey tilkomnu vóru ung og skúlabørn. Skúlin er vorðin meira fjølbroyttur og at síggja til eisini meira áhugaverdur.

Í seinastu viku arbeiddu næmingar í báðum sjeyndu flokkunum í Argja skúla við eini verkætlan, sum foreldrini høvdu høvi at síggja í skúlanum mánakvøldið.

Evnini, næmingarnir høvdu arbeitt við, vóru rættiliga ymisk og fjølbroytt, eitt nú ítróttur, tónleikur, móti, rúsevni og stoffir.

Næmingarnir høvdu gjørt uppslagstalvur við teksti og myndum, og við áhugaverdum filmsupptøkum og upplestri greiddu tey frá tí, tey høvdu fingið burtur úr.

Øll evnini vóru áhugaverd á hvør sín hátt.

Ein av bólkunum arbeiddi sum nevnt við temanum, tey kallaðu »stoffir«.

Yvirskriftin á talvuni var: Stoffir – sig nei til stoffir…

Ein av samrøðunum, næmingarnir høvdu gjørt, var við Toll og Skatt.

Spontant spyrja næmingarnir, um tey, sum koma til landið við hash, ofta verða tikin.

– Ja, vit taka í flestu førum tey, sum royna at smugla hash. Annars kunnu tey vænta at fáa løgregluna á nakkan!

Koma tey flestu, sum royna at smugla, við Norrönu ella við flogfari, spyrja næmingarnir?

– Tað eru sjálvsagt fleiri, sum verða tikin umborð á Norrönu. Tað er jú størri møguleiki at sleppa ígjøgnum við báti. Annars taka vit eisini nógv, sum koma við flogfari.

Halda tit, at tey, sum smugla, nýta tað sjálvi?

– Ja, tað gongur ofta soleiðis fyri seg, at tey, ið nýta stoffir, skylda nógvan pening fyri stoffir – og so smugla hesi fyri tey, sum selja. Kanska fáa tey so onkur stoffir afturfyri.

Eru tað fleiri mannfólk enn konufólk sum smugla?

– Tað eru fleiri mannfólk. Men um tað eru fleiri mannfólk enn konufólk, ið taka stoffir, vita vit ikki.

Soleiðis verður spurt, og soleiðis verður svarað. Stutt og greitt. Einki uttanumtos…

Ein áhugaverd løta í Argja skúla sum hugtók.



Eru tað fleiri mannfólk enn konufólk sum smugla? spyrja næmingarnir. - Tað eru fleiri mannfólk sum smugla. Men um tað eru fleiri mannfólk enn konufólk, ið taka stoffir, vita vit ikki, sigur Toll og Skatt

Mynd: Vilmund Jacobsen

Havnarkórið fyrireikar seg til Carnegie Hall

Sunnudagin 8. november verður ein søguligur dagur fyri føroyskan tónleik, tá 40 føroyingar trína á pall í heimsins størstu og kendastu konserthøll, Carnegie Hall í New York. Kórleiðarin í Havnarkórinum, Ólavur Hátún, er farin undir tónlistarligu fyrireikingarnar

KÓRSANGUR
Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

Nakað síðani vendi íslendski kórleiðarin Gardar Cortes seg til Ólav Hátún, kórleiðara í Havnarkórinum, við einum ikki sørt skelkandi fyrispurningi. Íslendska kórið hevði júst fingið innbjóðing at framføra í sjálvum Carnegie Hall í New York – eitt mekka í altjóða tónleikahøpi.

Ólavur tók av stóra møguleikanum, og í heyst skulu teir 40 sangararnir í havnarkórinum so vera partur av einum kóri við 300 fólkum úr Íslandi, Danmark, Australia, Onglandi og Írlandi. Íslendarin Gardar Cortes skal stjórna stóra kórinum, sum skal framføra tveir tíma drúgva verkið um Elias úr halgubók eftir Felix Mendessohn Barholdy.

Cortes hevur saman við Óløv Harðadóttir stovnað íslendska sangskúlan og er leiðari í íslendska operakórinum, og hevur hann seinnu árini havt samstarv við Havnarkórið.

Nakað síðani sendi hann útgávu við operakórinum og íslendska symfoniorkestrinum til Carnegie Hall, og ikki gekk long tíð, áðrenn Gardar Cortes fekk til uppgávu at savna eitt kór við 300 fólkum at framføra í New York, og tá komu føroyingar inn í myndina.



– Hetta er avgjørt størsta og mest avbjóðandi tiltak, havnarkórið nakrantíð hevur havt á skránni, og vit gleða okkum til spennandi tiltakið, sigur kórleiðarin Ólavur Hátún undan ferðini til størsta tónleikaumhvørvið í heiminum, Carnegie Hall í New York

Størsta avbjóðing nakrantíð

Havnarkórið hevur verið mangar uttanlandsferðir og sungið, men hesaferð er talan um nakað heilt serligt.

– Hetta er avgjørt størsta og mest avbjóðandi tiltak, Havnarkórið nakrantíð hevur havt á skránni, og tískil verður talan um eitt sera spennandi tiltak, sum vit gleða okkum til, sigur kórleiðarin Ólavur Hátún, sum í 34 ár hevur verið primus motor í kórinum.

Ólavur boðaði beinanvegin frá, at hann bert vildi taka sær av tí tónlistarliga og ikki tí praktiska, sum hann metir hevði verið ov tungt.

– Vit hava sett ein bólk, sum tekur sær av tí praktiska og fíggjarliga, og tey gera eitt sera gott arbeiði, greiðir Ólavur Hátún frá og sigur, at tað er ein stórur lætti bert at hava høvuðsábyrgdina av tí tónlistarliga. Hann heldur, at arbeiðið má býtast upp, tí tað verður ov tungt, tá somu fólkini skulu taka sær av báðum, sum onkuntíð fyrr er hent.

Fleiri konsertir í USA

Umframt stóru løtuna í Carnegie Hall skal Havnarkórið luttaka á tveimum ella trimum konsertum í USA.

– Umframt at framføra høvuðsverkið um Elias fara vit eisini at framføra føroyska dansin, sum áhoyrarunum plaga at dáma sera væl, og við føroyska flagginum vundið á stong fara vit at gera okkara ítarsta til, at Føroyar koma á heimskortið har yviri, sigur Ólavur Hátún. Kórleiðarin leggur afturat, at verkið eftir ætlan skal framførast í føroyskum kirkjum, áðrenn teir 40 kórsangararnir leggja tvørtur um Atlantshav til fína selskapið í størstu tónlistarligu háborgini í heiminum.

– Higartil hava vit havt eina venjingarlegu, og vit skulu hava eina afturat í næstum, tá Gardar Cortes úr Íslandi kemur til Føroya, sigur Ólavur Hátún at enda, sum fram til november hevur stóru ábyrgdina at fyrireika stóru uppgávuna, tá Havnarkórið skrivar søgu við framførslu í Carnegie Hall.

Gyltur møguleiki fyri føroyskt vinnulív

– Vit ætla at profilera og marknaðarføra føroysku tjóðina í New York, og tí er hetta eisini ein gyltur møguleiki fyri føroyskt vinnulív, sigur Magnus Hansen í Havnarkórinum, ein av fyrireikarunum til ferðina til Carnegie Hall

KÓRSANGUR
Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

Fyri stuttum sendi Havnarkórið 105 brøv út til føroyskar fyritøkur kring landið við vón um stuðul og samstarv í sambandið við dýru ferðina til Carnegie Hall í New York, men Magnus Hansen, sum saman við bólki fyrireikar ferðina, er ikki nøgdur við úrslitið higartil.

Stuðul og samstarv við vinnuna

– Nógv verður prátað um samstarv millum vinnulív og mentan, og ferð okkara er í veruleikanum ein gyltur møguleiki at marknaðarføra føroyskar fyritøkur og ferðavinnu, men higartil hevur vinnan ikki víst serligan áhuga at samstarva í serliga stóran mun, sigur Magnus Hansen í Havnarkórinum, sum situr í fyrireikingarbólkinum til ferðina.

– Eg meti ferð okkara sum ein einastandandi møguleika hjá føroyskum útflutningsfyritøkum at gera brúk av okkum fyri at gerast kendar í USA, sigur Magnus Hansen. Hann leggur afturat, at Havnarkórið á henda hátt bjóðar seg at vera eitt sendiumboð fyri Føroyar.

Sum vanligt er til slíkar uttanlandsferðir, gjalda kórlimirnir ein part av útreiðslunum sjálvir. Men í hesum føri er talan um sera stórar upphæddir – eina lítla millión – og tí bjóðar kórið seg fram til samstarv við vinnulívið í Føroyum.

– Vit biðja ikki um stuðul fyri einki men vilja heldur hava samstarv í lag við vinnuna, og tað vil siga, at kórið fyri samsýning bjóðar seg fram at syngja, eitt nú til veitslur, aðalfundir o.a., sum fyritøkur skipa fyri, greiðir Magnus Hansen frá.

Nevndin fyrireikar í løtuni eitt átak í USA, so New York íbúgvar og aðrir amerikanarar longu áðrenn ferðina í oktober og november kenna munandi meiri enn higartil til Føroyar, føroyska søgu og føroyska vinnu.

– Til ferðina ferð Havnarkórið eisini at prenta eina 4-litta skrá, har útflutningsfyritøkur, land, kommunur og ferðavinna fáa høvi, móti gjaldi sjálvandi, at lýsa og greiða frá um seg sjálvan, og vit vóna, at vinnan er sinnað til hetta, sigur Magnus Hansen.

Íslendska vinnan og Bjørk

Magnus Hansen nevnir sum dømi, at íslendska vinnan hevur verið við í marknaðarføringini av íslendsku songvinnuni, og úrslitið er, at Ísland fær umtalu úti í heimi, sum aftur kemur íslendingum til góða.

– Á sama hátt kann sigast um okkara fótbóltslandslið, sum við avrikum sínum uttanlanda marknaðarførir Føroyar og setir lítlu oyggjar okkara á heimskortið, og endamál okkara er at hava somu funktión, greiðir Magnus Hansen frá.

Hann heldur, at tá talan er um framførslu í heimsins kendasta konserthøll, óivað við nógvum fjølmiðlum til staðar, kann hetta sammetast við, um Føroyar spældu HM finalu í fótbólti, og tiskil skuldi verið upplagt hjá vinnuni at gera sær dælt av marknaðarførslu.

– Um hetta nú ikki eydnast okkum, fara vit undir øllum umstøðum avstað, og so mugu vit gjalda meiri sjálvi, slær Magnus Hansen fast, sum saman við fyrireikingarbólki í Havnarkórinum í hesum døgum fyrireikar stóru ferðina til Carnegie Hall.

Havnarkórið fyrireikar seg nú til heimsins kendasta konserthús, Carnegie Hall, men striltið gongur at fáa samstarv í lag við vinnuna